Treytir fyri gjaldskontur hjá privatkundum

Føroya Banki

Galdandi frá 22.10.2026

1. Inngangur

Hesar treytir eru galdandi fyri gjaldstænastur, sum eru bundnar at gjaldskontum, sum eru ætlaðar til at fremja gjaldsflytingar.

Ein gjaldskonta er t.d. ein lønarkonta, men ikki ein samansparingarkonta.

Fyri at nýta gjaldstænastur mást tú vanliga hava eina serstaka avtalu um at nýta viðkomandi gjaldsamboð, t.d. mást tú hava eina gjaldskortavtalu fyri at fáa gjaldskort. Serstøk avtala krevst tó ikki fyri at gera kontant inn- og útgjøld í deildum hjá peningastovninum umframt flytingar til tínar egnu kontur.

2. Samtykki til viðgerð av persónupplýsingum

Tá ið ein avtala verður gjørd um at stovna gjaldskontu, gevur tú samstundis samtykki til, at tínar persónupplýsingar kunnu viðgerast í sambandi við hetta tænastutilboð. Eisini gevur tú samtykki til, at persónupplýsingarnar kunnu brúkast til og í sambandi við at fremja ella rætta gjaldsflyting. Tær persónupplýsingar, sum talan er um, eru t.d. navn, bústaður og kontunummar.

Upplýsingarnar verða goymdar tað árið, tær verða latnar peningastovninum, og fimm ár afturat.

Tú kanst til eina og hvørja tíð taka títt samtykki aftur, men tú skalt vera varug/ur við, at um so er, fært tú ikki brúkt kontuna hjá tær.

3. Lóg um gjalding

Fyriskipan um gildiskomu fyri Føroyar av lóg um gjaldingar verður brúkt í sambandi við inn- og útgjøldum á gjaldskontum.

Brot úr lógini viðvíkjandi skuldbinding og ábyrgd er hjálagt. Allur lógarteksturin sæst á www.logir.fo.

4. Gjaldstænastur

Gjaldstænastur eru tænastur, sum gera inngjøld á og útgjøld av gjaldskontu gjørlig. Dømi um gjaldstænastu eru netbanki og Visa/Dankort.

Inngjald á gjaldskontu kanst tú gera kontant, við kekki úr útheiminum ella við at flyta av kontu í tínum peningastovni ella øðrum peningastovni.

Útgjald av gjaldskontu kanst tú fremja kontant, við flyting til kontu í tínum peningastovni ella til kontu í øðrum peningastovni við at brúka gjaldsamboð og við at gjalda rokningar.

5. Upplýsingar, ið skulu latast fyri at nýta gjaldstænastu

Tá ið talan er um útgjald, skalt tú upplýsa skrásetingarnummar og kontunummar á kontuni, ið upphæddin skal flytast av.

Tá ið talan er um flytingar innanlands, skalt tú harafturat upplýsa skrásetingarnummar og kontunummar á tí kontu, sum upphæddin skal flytast á.

Tá ið talan er um gjaldsflyting um landamørk, skalt tú harafturat upplýsa IBAN og SWIFT-eyðkenni hjá móttakara.

Um illgruni er um hvítvasking ella fígging av yvirgangi, skal SWIFT lata amerikansku myndugleikunum upplýsingar um flytingina.

Tá ið talan er um felags gjaldskort, skal FI-kreditornummar upplýsast.

Peningastovnurin metir eina flyting sum rætt framda, um hon er í samsvari við ta eintýddu eyðmerkingina, sum er viðmerkt í gjaldsumbønini.

6. Mannagongd fyri gjaldsflyting

Tú kanst t.d. lata gjaldsumbøn inn:

- við at venda tær persónliga til peningastovnin
- í netbankanum
- við at senda peningastovninum bræv.

Útgjald skal váttast við tíni undirskrift við Samleikanum í netbankanum ella á annan avtalaðan hátt.

Ein fyritreyt fyri, at peningastovnurin fær framt eina gjaldsumbøn, er, at dekningur er fyri upphæddina á viðkomandi kontu.

Tá ið peningastovnurin hevur fingið eina gjaldsumbøn, ber ikki til at taka hana aftur.

Ein gjaldsumbøn, sum ikki skal fremjast fyrr enn seinni, kann tó takast aftur í seinasta lagi seinasta bankadagin fyri tí degi, sum gjaldsumbønin eftir ætlan skal fremjast.

Um tú vilt taka eina gjaldsumbøn aftur, kanst tú antin gera tað í netbankanum, ella tú kanst seta teg í samband við peningastovnin. Peningastovnurin tilskilar sær rætt til at taka ómaksgjald fyri afturtøkuna.

Um ein gjaldsumbøn verður noktað vegna skeivar upplýsingar, boðar peningastovnurin tær frá, at gjaldsumbønin er noktað, greiðir tær frá orsøkini til noktanina og hvussu mistakið, sum elvdi til noktanina, kann rættast.

7. Móttøka av gjaldsumbøn

Ein gjaldsumbøn verður mett at vera móttikin tann bankadagin, tá ið peningastovnurin fær gjaldsumbønina.

Leygar-, sunnu- og halgidagar, flaggdagur, grundlógardagur, ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur, jólaaftan og nýggjársaftan eru ikki bankadagar.

Gjaldsumbønir, sum peningastovnurin fær móti endanum á einum bankadegi ella millum tveir bankadagar, verða mettar at vera móttiknar næsta bankadagin og verða ikki avgreiddar fyrr enn bankadagin eftir. Tú kanst fáa fleiri upplýsingar um seinastu freist fyri móttøku av gjaldsumbønum, sum skulu avgreiðast sama bankadag, við at venda tær til peningastovnin.

8. Avgreiðslutíð

Avgreiðslutíðin fevnir um tíðina, tað tekur, til gjaldsflytingin verður sett á kontu hjá móttakara.

Avgreiðslutíðin fyri inn- og útgjøld í Føroyum og í og úr EØS-londum í EØS-gjaldoyra er vanliga í mesta lagi 1 bankadag, men annars veldst um slag av flyting og gjaldoyra.

Er talan um gjaldsumbønir, sum bankin fær á pappíri, íroknað inngjaldskort, ella sum talgild boð, kann avgreiðslutíðin vera upp til 2 bankadagar.

9. Upplýsingar um framdar gjaldingar

Upplýsingar um gjaldsflyting verða latnar á pappíri ella talgilt minst 1 ferð um mánaðin.

10. Prísir

Tú sært prísirnar í prísbókini hjá peningastovninum. Harumframt letur peningastovnurin tær minst eina ferð um mánaðin upplýsingar um ávísar gjaldingar á gjaldskontu.

Verður ein upphædd flutt á tína kontu, hevur peningastovnurin rætt til at draga møguligt gjald fyri flytingina frá tí fluttu upphæddini, áðrenn hon verður sett á tína kontu.

Peningastovnurin skilar sær rætt til at krevja gjald fyri at boða frá orsøkini til, at ein gjaldsumbøn er noktað.

Peningastovnurin skilar sær rætt til at krevja gjald fyri at royna at kalla pening aftur, tá ið tú hevur upplýst skeiva kontu ella eyðmerking.

Tá ið peningastovnurin móttekur gjaldsflyting úr útheiminum, verður gjald møguliga drigið frá tí fluttu upphæddini.

11. Vekslikursur

Peningastovnurin vekslar gjaldoyra fyri teir kursir, sum peningastovnurin hevur ásett fyri keyp og sølu tann arbeiðsdag, tá ið inn- og útgjald verða framd.

Peningastovnurin kann gera broytingar í ásettum vekslikursi uttan ávaring.

12. Mál og samskifti

Peningastovnurin ger avtalur og samskiftir á føroyskum, uttan so at annað stendur í ítøkiligu avtaluni.

13. Eftirlit við bókingum

Tú hevur skyldu til at hava leypandi eftirlit við bókingum á tíni kontu. Um tú í eftirlitinum finnur flytingar, sum ikki samsvara við tínar kvittanir, ella sum tú ikki heldur teg hava gjørt, skalt tú beinanvegin seta teg í samband við peningastovnin.

Gev gætur, at tín møguleiki at mótmæla óheimilaðari ella skeivari gjaldsflyting í øllum førum fellur burtur 13 mánaðir eftir, at upphæddin er tikin av tíni kontu.

14. Fráboðan

Um vitan ella illgruni er um, at misbrúk er framt ella trygdarhóttanir eru framdar, kann peningastovnurin boða tær frá hesum í netbankanum ella aðra líknandi trygga mannagongd.

15. Stongsil

Peningastovnurin hevur rætt til at steingja tína atgongd til gjaldstænastu alt fyri eitt ella at sýta fyri at fremja eina gjaldsflyting, um:

a) tað er vitan ella illgruni um, at ein triði persónur av órøttum brúkar gjaldstænastuna
b) tað er vitan ella illgruni um, at dátur um gjaldstænastur ella gjaldsamboð eru avdúkaðar
c) ein gjaldstænasta innan fyri stutta tíð verður brúkt øðrvísi enn vanligt
d) tú ella ein persónur, sum arbeiðir tína vegna, má metast ikki at hava evnini til at bera seg at við skili
e) tú ella peningastovnurin sigur upp kundaviðurskiftini ella kontuna, sum gjaldstænastan er knýtt at, ella um onkur støða er, sum ger, at kontan kann sigast upp uttan ávaring
f) hesar treytir ikki verða hildnar, harumframt um trot er á gjaldskontuni, sum gjaldstænastan er knýtt at
g) tað annars er stórur vandi fyri, at tú ikki fært lokið tínar gjaldsskyldur, hóast kredittloyvi er til taks í sambandi við gjaldstænastuna
h) eitt gjaldsamboð er endurnýggjað, og tað gamla av trygdarávum skal steingjast
i) farið verður upp um avtalað hægsta mark á upphædd
j) tað annars er neyðugt við fyriliti fyri trygdini í gjaldstænastuni, ella um talan er um illgruna um órættaða nýtslu.

Um talan er um trot, fært tú, um til ber, eina áminning, áðrenn gjaldstænastan verður stongd.

Um peningastovnurin noyðist at steingja gjaldskontuna í stundini, fært tú beint eftir stongsilin boð um og grundgeving fyri, hví og nær gjaldskontan er stongd.

16. Óheimilað gjaldsflyting

Hefti og ábyrgd verður býtt sundur í samsvari við §§ 97-100 í gjaldlógini, sum er hjáløgd.

17. Ábyrgdin hjá peningastovninum at avgreiða gjaldsflyting

Peningastovnurin hevur ábyrgd av tínum beinleiðis missi av vantandi ella ófullfíggjaðari avgreiðslu av gjaldingum í samsvari við hesar treytir. Tað er tó ikki galdandi, um peningastovnurin fær prógvað, at peningastovnurin hjá gjaldsmóttakaranum hevur fingið upphæddina.

18. Afturgjalding av gjaldsflyting framd av ella umvegis gjaldsmóttakara

Hefti og ábyrgd verður býtt sundur í samsvari við §§ 101-102 í gjaldlógini, sum er hjáløgd.

19. Gildiskoma og gildistíð

Hesar treytir eru galdandi frá tilskilaðu dagfesting, til peningastovnurin broytir ella sigur tær upp.

20. Uppsøgn

Um tú vilt siga tínar avtalur upp um at brúka gjaldskontur, skal tað gerast við eini freist á 1 mánað.

Peningastovnurin kann við eini freist á 2 mánaðir siga avtalur upp um gjaldskontur.

21. Kærur

Um tú vilt kæra peningastovnin, skalt tú í fyrstu atløgu seta teg í samband við ta deildina í peningastovninum, sum umsitur tíni kundaviðskifti.

Um tú eftir hetta ert ósamd/ur við peningastovnin um viðgerðina av tíni áheitan ella úrslitið av henni, kanst tú seta teg í samband við kæruábyrgdarhavaran í peningastovninum. Upplýsingar um kæruábyrgdarhavara fáast í peningastovninum ella á heimasíðuni hjá peningastovninum.

Um nøktandi loysn framvegis ikki finst millum teg og peningastovnin, kanst tú kæra til donsku Fíggjarligu Kærunevndina (Det Finansielle Ankenævn), tlf. 35 43 63 33, www.fanke.dk. Kæran skal orðast á donskum ella enskum.

Kæra um, hvørt peningastovnurin heldur fíggjarliga lóggávu, kann leggjast fyri Fíggjareftirlitið (Finanstilsynet), www.finanstilsynet.dk. Kæran skal orðast á donskum ella enskum.

Kæra viðvíkjandi viðgerð av persónupplýsingum hjá peningastovninum kann leggjast fyri Dátueftirlitið, www.dat.fo

22. Veitari av gjaldstænastum

Føroya Banki, Oknarvegur 5, 110 Tórshavn, hevur loyvi sum peningastovnur og er undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum, www.finanstilsynet.dk.

Samband fæst við Føroya Banka á Oknarvegi 5, Postsmoga 3048, 110 Tórshavn
Teldupostur: kundi@bankin.fo
Tel: 330 330

23. Lógarval og varnarting

Rættarligar ósemjur millum teg og peningastovnin verða avgjørdar eftir føroyskum/donskum rætti og við ein føroyskan/danskan dómstól.

24. Avrit av hesum treytum

Tú kanst altíð fáa avrit av hesum treytum við at venda tær til peningastovnin. Tú kanst eisini finna tær á heimasíðuni hjá peningastovninum.

25. Vanligar viðskiftatreytir o.a.

Fyri gjaldskontur og gjaldstænastur eru *Vanligu viðskiftatreytirnar fyri privatkundar* hjá peningastovninum galdandi.

Fyri gjaldingar í útheimin og úr útheiminum eru *Treytir fyri flytingar til útheimin og frá útheiminum* galdandi.

26. Broytingar í treytum fyri gjaldskontur

Hesar treytir kunnu broytast við eini fráboðanarfreist á 2 mánaðir, um broytingin ikki er til tín fyrimun. Tú fært boð um broytingar antin skrivliga ella talgilt. Aðrar broytingar kunnu henda uttan fráboðanarfreist, og peningastovnurin kunnar síðani um hetta.

Ein fráboðað broyting av hesum treytum verður mett at vera góðtikin, uttan so at tú áðrenn dagin, hon kemur í gildi, hevur boðað peningastovninum frá, at tú ikki vilt vera bundin av teimum nýggju treytunum. Um tú boðar frá áðrenn gildisdagin, fer avtalan millum teg og peningastovnin um at brúka gjaldstænastur úr gildi, tá ið tær broyttu treytirnar koma í gildi.

27. Prísir

Vanligu prísirnir/avgjøldini síggjast í prísbókini hjá peningastovninum. Prísbókin fæst á deildunum hjá peningastovninum ella sæst á heimasíðuni hjá peningastovninum.

Fyriskipan um gildiskomu fyri Føroyar av lóg um gjaldingar §§ 97 - 102

§ 97. Indsigelser mod uautoriserede eller fejlbehæftede betalingstransaktioner skal være udbyderen i hænde, snarest muligt efter at betaleren har konstateret en sådan betalingstransaktion og senest 13 måneder efter debiteringen af den pågældende betalingstransaktion. Fristen regnes fra det tidspunkt, hvor udbyderen har meddelt disse oplysninger eller stillet dem til rådighed, hvis ikke de er meddelt på forhånd.

Stk. 2. Indsigelser mod uautoriserede eller fejlbehæftede betalingstransaktioner, der er iværksat via en udbyder af betalingsinitieringstjenester, skal rettes til den kontoførende udbyder i henhold til stk. 1, jf. dog § 99, stk. 2 og 3, og § 104.

§ 98. Hvor en betaler nægter at have autoriseret eller iværksat en betalingstransaktion, har udbyderen af betalingstjenesten bevisbyrden for, at betalingstransaktionen er korrekt registreret og bogført og ikke er ramt af tekniske svigt eller andre fejl, jf. dog stk. 3. Ved brug af et betalingsinstrument har udbyderen endvidere bevisbyrden for, at den til betalingsinstrumentet hørende personlige sikkerhedsforanstaltning er blevet anvendt i forbindelse med betalingstransaktionen.

Stk. 2. Hvor en betaler nægter at have autoriseret eller iværksat en betalingstransaktion, er registrering af brug af betalingsinstrumentet ikke i sig selv bevis for, at betaleren har godkendt transaktionen, at betaleren har handlet svigagtigt, eller at betaleren har undladt at opfylde sine forpligtelser.

Stk. 3. Hvor en betaler nægter at have autoriseret eller iværksat en betalingstransaktion, der er iværksat via en udbyder af betalingsinitieringstjenester, bærer udbyderen af betalingsinitieringstjenesten bevisbyrden for, at betalingstransaktionen inden for dennes kompetenceområde er korrekt registreret og bogført og ikke er ramt af tekniske svigt eller andre fejl.

§ 99. Betalerens udbyder af betalingstjenester hæfter i forhold til betaleren for tab som følge af uautoriserede betalingstransaktioner, jf. § 97, medmindre andet følger af § 100. Ved en uautoriseret transaktion skal betalerens udbyder straks og senest ved afslutningen på den efterfølgende arbejdsdag tilbagebetale betaleren beløbet, medmindre betalerens udbyder har rimelige grunde til at have mistanke om svig og underretter Finanstilsynet om disse grunde.

Stk. 2. Hvor en uautoriseret betalingstransaktion er iværksat via en udbyder af betalingsinitieringstjenester, skal den kontoførende udbyder tilbagebetale betaleren beløbet straks og senest ved afslutningen på den efterfølgende arbejdsdag, jf. stk. 1.

Stk. 3. Er udbyderen af betalingsinitieringstjenester ansvarlig for den uautoriserede betalingstransaktion, skal udbyderen af betalingsinitieringstjenesten efter den kontoførende udbyders anmodning straks holde den kontoførende udbyder skadesløs for tab eller betalte beløb som følge af tilbagebetalingen til betaleren, jf. § 98, stk. 3.

Stk. 4. Finanstilsynet fastsætter nærmere regler om den tekniske gennemførelse af underretningen, jf. stk. 1, 2. pkt.

§ 100. Betalerens udbyder af betalingstjenester hæfter i forhold til betaleren for tab som følge af andres uberettigede anvendelse af en betalingstjeneste, medmindre andet følger af stk. 2-5. Betaleren hæfter kun efter stk. 3-5, hvis transaktionen er korrekt registreret og bogført, jf. dog stk. 2. *Stk. 2.* Betaleren hæfter uden beløbsbegrænsning for tab, der opstår, som følge af at betaleren har handlet svigagtigt eller med forsæt har undladt at opfylde sine forpligtelser efter § 93.

Stk. 3. Medmindre videregående hæftelse følger af stk. 4 og 5, hæfter betaleren med op til 375 kr. for tab som følge af andres uberettigede anvendelse af betalingstjenesten, hvis den til betalingstjenesten hørende personlige sikkerhedsforanstaltning har været anvendt.

Stk. 4. Medmindre videregående hæftelse følger af stk. 5, hæfter betaleren med op til 8.000 kr. for tab som følge af andres uberettigede anvendelse af betalingstjenesten, hvis betalerens udbyder godtgør, at den til betalingstjenesten hørende personlige sikkerhedsforanstaltning har været anvendt, og

1) at betaleren har undladt at underrette betalerens udbyder snarest muligt efter at have fået kendskab til, at det til betalingstjenesten hørende betalingsinstrument er bortkommet eller den personlige sikkerhedsforanstaltning er kommet til den uberettigedes kendskab,
2) at betaleren med forsæt har overgivet den personlige sikkerhedsforanstaltning til den, der har foretaget den uberettigede anvendelse, uden at forholdet er omfattet af stk. 5, eller
3) at betaleren ved groft uforsvarlig adfærd har muliggjort den uberettigede anvendelse.

Stk. 5. Betaleren hæfter uden beløbsbegrænsning for tab, der opstår som følge af andres uberettigede anvendelse af betalingstjenesten, når den til betalingstjenesten hørende personlige sikkerhedsforanstaltning har været anvendt og betalerens udbyder godtgør, at betaleren med forsæt har oplyst den personlige sikkerhedsforanstaltning til den, der har foretaget den uberettigede anvendelse, og at det er sket under omstændigheder, hvor betaleren indså eller burde have indset, at der var risiko for misbrug.

Stk. 6. Uanset stk. 3-5 hæfter betalerens udbyder for uberettiget anvendelse, der finder sted,

1) efter at udbyderen har fået underretning om, at det til betalingstjenesten hørende betalingsinstrument er bortkommet, at en uberettiget person har fået kendskab til den personlige sikkerhedsforanstaltning, eller at betaleren af andre grunde ønsker betalingsinstrumentet spærret,
2) når det er forårsaget afhandlinger, der er foretaget af en udbyders ansatte, agent eller filial eller en enhed, hvortil udbyderens aktiviteter er outsourcet, eller disses passivitet, eller
3) fordi udbyderen ikke har truffet egnede foranstaltninger, jf. § 94, stk. 1, nr. 2.

Stk. 7. Uanset stk. 3-5 hæfter betalerens udbyder tillige, hvis udbyderen ikke kræver stærk kundeautentifikation, medmindre betaleren har handlet svigagtigt. Betalingsmodtageren eller dennes udbyder skal godtgøre de tab, der er påført betalerens udbyder, hvis betalingsmodtageren eller dennes udbyder har undladt at anvende stærk kundeautentifikation. 1. og 2. pkt. finder ikke anvendelse på tjenester omfattet af § 1, stk. 5, og § 5, nr. 14-16.

Stk. 8. Uanset stk. 3-5 hæfter betalerens udbyder tillige, hvis tabet, tyveriet eller den uberettigede tilegnelse af det til betalingstjenesten hørende betalingsinstrument eller den til betalingstjenesten hørende personlige sikkerhedsforanstaltning ikke kunne opdages af betaleren forud for den uberettigede anvendelse.

Stk. 9. Uanset stk. 3-5 hæfter betalerens udbyder tillige, hvis betalingsmodtageren vidste eller burde vide, at der forelå en uberettiget anvendelse af betalingstjenesten.

Stk. 10. Stk. 1-9 finder tillige anvendelse på elektroniske penge, medmindre det ikke er muligt for betalerens udsteder af elektroniske penge at spærre betalingskontoen eller betalingsinstrumentet.

§ 101. En betaler har fra sin udbyder ret til tilbagebetaling af det fulde beløb for en gennemført betalingstransaktion, som er iværksat af eller via betalingsmodtageren, såfremt

1) betaleren ikke har godkendt det præcise beløb for betalingstransaktionen og
2) betalingstransaktionen oversteg det beløb, som betaleren med rimelighed kunne forvente, bl.a. under hensyn til dennes tidligere udgiftsmønster og betingelserne i rammeaftalen.

Stk. 2. Ændringer i valutakursen, når denne beregnes på baggrund af en referencekurs, kan ikke påberåbes ved anvendelse af stk. 1, nr. 2.

Stk. 3. Det kan aftales i rammeaftalen mellem betaleren og betalerens udbyder, at betaleren ikke har ret til tilbagebetaling efter stk. 1, hvis et samtykke til at gennemføre betalingstransaktioner omfattet af stk. 1 er givet direkte til betalerens udbyder og oplysninger om den fremtidige betalingstransaktion af udbyderen eller betalingsmodtageren blev givet eller stillet til rådighed for betaleren mindst 4 uger inden forfaldsdagen.

Stk. 4. For direkte debiteringer kan det af rammeaftalen mellem betaleren og betalerens udbyder fremgå, at betaleren har ret til tilbagebetaling fra sin udbyder, selv om kravene efter stk. 1 ikke er opfyldt.

Stk. 5. (Sættes ikke i kraft for Færøerne)

§ 102. En anmodning om tilbagebetaling, jf. § 101, skal være udbyderen i hænde senest 8 uger efter debiteringen af den pågældende betalingstransaktion.

Stk. 2. Betalerens udbyder skal senest 10 arbejdsdage efter modtagelse af en anmodning om tilbagebetaling enten tilbagebetale hele transaktionsbeløbet eller begrunde et afslag på tilbagebetaling med oplysning om klagemuligheder.

Stk. 3. (Sættes ikke i kraft for Færøerne)